# Til gagns onkursvegna

ROLF GUTTESEN



Hetta eru orð, sum Oddvør Johansen í viðmerking í Dimmu hósdagin brúkar. Meiningina kann eg stuðla fult út. Lat tað, sum tú og eg gera, koma til gagns onkursvegna. Men nú eru fleiri bólkar, flokkar, klassar, meiningar, linjur ella hvat tú vilt kalla tað í samfelagnum. Í tí liggur rótin til ósemjur. Summar kunna loysast við samtalu og orðaskifti, men helst ikki allar.

**Kritiskur ella negativur**

Oddvør meinar, at tað negativa, tað kritiska, fyllir ov nógv í mínari skriving. Hartil eru tvey ting at siga.

Eitt: tað ljóðar sum OJ bert kennir mína skriving í Sosialinum hesi seinnu árini, um politisk og samfelagslig viðurskiftir. Framleiðslan er tíbetur væl breiðari enn so.

Tvey: at tað at vera kritiskur, og tað at vera negativur og eitrandi, sum hon tekur til, er tað sama. Eg meini, at tað er munur á at vera kritiskur, og at vera niðurgerandi og negativur.

**Skulu politiskar dáragerðir gloymast?**

So sigur OJ, at her loypir ketan av. "Hálvtrýss til hundrað ára gomul politisk mistøk og dáragerðir, sum í tjóðskaparligum ovurhuga ella býttleika eru gjørd í einai fjarari fortíð, skulu "upplýsa" føroyingar"

Eg vil siga, at her eru vit ósamd. Um ikki dáragerðir skula fram, so skula tær goymast? Hugsa tær, at dáragerðir í europeiskari søgu hesi seinastu 50-100 árini skuldu gloymast? Tað ber ikki til.

Eg meini, at søgulig fakta, bæði dáragerðir og mistøk, skula fram til kritiska viðgerð. Annars ber ikki til at "læra nakað av søguni", sum man plagar at siga. Um tað er gjørt í tjóðskaparligum, nationalistiskum, kapitalistiskum, socialistiskum ella religiøsum ovurhuga ella býttleika er líka mikið.

**Søga sum væl onduleraðar mytur**

Ein søga, sum byggir á væl onduleraðar mytur, er ikki bara býtt og tápulig, men kann vera beinleiðis farlig. Ein søguuppfatan, sum barberar mistøk og dáragerðir hjá tjóðskaparrørsluni ella nationalistunum burtur, er óvísindalig og farlig. Kann føra til indoktrinering og tað, sum verri er. Er tað tað, sum Oddvør vil? Eg fái meg ikki at trúgva tí. Men hví eru á nationalistiska vonginum so sjarrlig, tá tað kemur til kritikk?

Eg noyðist líka at rættleiða OJ um eitt aftrat, sum hon skrivar: "Nógv fólk, bæði livandi og deyð, verða hunddálkað og háað" Eg havi ongantíð 'hunddálkað' fólk, men eg havi kritiserað teirra politisku støðu og gerðir. Og tað havi eg, og øll onnur, fullan rætt til. Sakin er, at munur er á einum privatpersóni og einum almennum persóni. Politikkarar eru almennir persónar, sum í skrift og talu leggja teirra sjónarmið fram, og berjast fyri at fáa síni sjónarmið ígjøgnum. Tað er í lagi, soleiðis skal tað vera. Samstundis hava teir eisini eina privata síðu, men hon er mest sum uttan áhuga í hesum sambandi.

**Almennir og privatir persónar**

Men at almennir persónar, sum til dømis politikkarar, skula vera friðaðir sum katólsk halgimennir, og eingin má umtala teir kritiskt, sjálvt um teir deyðir, tað er aftur ein misskiljing.

Teir, sum allarhelst vildu sleppa at vera ein partur av søguni, skula vurderast uppá teirra politiska avrik. Kanska hevur OJ í huga, at eg fyri nøkrum árum dokumenteraði at ein føroyskur politikari hevði gott samband við nazistar ella nazi-sympatisørar í Norra. Tað bleiv tá eisini uppfatað næstan sum ein skandala, at tað kom fram. Men tað er ein partur av søguni, sum ikki eigur at barberast burtur, kávast útyvir ella "gloymast".

Tann, sum ikki orkar at síggja søguna í síni grummheit og mangfoldigheit, kann sigast at vera passé.




# Sosialurin misskilir við vilja

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin



Í somu løtu, Landsstýrið er sinnað at boða donsku stjórnini frá einum ynski um at tiðna blokkin, so inntøkurnar á føroysku fíggjarlógini kunnu vaksa, er fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum til reiðar at virka fyri málinum í Fólkatinginum

Oddagreinirnar í Sosialinum eru stundum ... skulu vita siga, áhugaverdar.

Avmarkað er, hvussu nógva orku man skal brúka uppá rættleiðingar, men lat meg tó gera nakrar stuttar viðmerkingar til oddagreinina í Sosialinum tann 25. jan.

Har førir blaðið fram, at nú Edmund Joensen aftur gerst tungan á vágskálini í donskum politikki, kann hann syrgja fyri, at fastfrystingin av ríkisveitingini verður strikað.

Hvør skal siga: Nú ræður Edmund í Fólkatinginum og í stjórnini, so nú kann hann, einsamallur maður, "tiðna blokkin"..

Soleiðis hanga tingini sjalvandi ikki saman í veruleikanum. Tað vita tey flestu. Eisini blaðstjórnin á Sosialinum. Men lat okkum skera tað út í papp.

Tað var táverandi landsstýrið, ið tók vanlukkuligu avgerðina um at heita á donsku stjórnina um at skerja og síðani fastfrysta blokkin, ið annars eigur at verða reguleraður á hvørjum ári.

Tí er tað eisini upp til Landsstýrið at heita á donsku stjórnina um at tiðna blokkin aftur.

Higartil hevur Landsstýrið – eisini núverandi ABC-landsstýrið – ikki vilja tikið hesa avgerð.

So seint sum tann 22. september í 2009 gav landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, ið eisini er formaður í Javnaðarflokkinum, donsku stjórnini boð um, at ongin broyting skuldi heldur fremjast í ríkisveitingini fyri 2010.

Við øðrum orðum: Vælferð hjá føroyingum fyri milliónir varð tveitt út gjøgnum vindeygað. Tað havi eg víst á áður, og eg skal gjarna gera tað enn eina ferð.

Júst í hesum døgum rakar hetta teir veiku samfelagsbólkarnir hart. Komandi ár verða hesir bólkar upp aftur harðari raktir, tí tá skal veruliga sparast á almenna budgettinum.

Hetta veit blaðstjórnin á Sosialinum eisini.

Eitt er tó púra vist: Í somu løtu, Landsstýrið er sinnað at boða donsku stjórnini frá einum ynski um at tiðna blokkin, so inntøkurnar á føroysku fíggjarlógini kunnu vaksa, er fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum til reiðar at virka fyri málinum í Fólkatinginum.

Eisini tað munnu tey vita, ið skriva oddagreinar í Sosialinum. Men tey hava helst eina heilt aðra interessu í málinum.

*Framhald av síðu 14*

meirnýtsluni, so tekur JE nokk feil.

Løgtingið sigur ikki, tá tað góðkennir roknskapir fyri farin ár, at tað er í lagi, tað sum er farið fram. Men løgtingið sigur hinvegin, tá ið tað tekur undir við landsroknskapinum, at *tøliniog viðmerkingarna,* sum landsgrannskoðanin er komin fram til í roknskapinum eru røtt.

Og tað er munur á tí, og so at góðtaka lógarbrotini sum landsgrannskoðanin ár eftir ár kritiserar og avdúkar í landsroknskapinum!

Um løgtingið hevur medábyrgd av tí, sum verður lagt fram og avdúkað í landsroknskapinum, so er landsgrannskoðarin og stovnurin undir honum væl sagtans eisini partur av hesum kritikki, tí tað er har, tølini verða viðgjørd og fest á blað!

**"Konsekvensir"**

Eitt av kritikkpunktunum kom frá advokati, sum viðmerkti niðurstøðuna hjá lmn, men legði hesin afturat *"konsekvensirnar av tí, tað er har sum ketan fer av hjá teimum, sum hava viðgjørt hetta málið."* Men her fer advokaturin skeivir! Vit siga nemliga onki um konsekvensir. Vit siga hinvegin í niðurstøðuni, at: *"Um stig skulu verða tikin til, at eitt lógarbrot skal fáa rættarligar ella politiskar avleiðingar, er ein politiskur spurningur, sum Landsstýrismálanevndin ikki viðger ella tekur støðu til."!*

Uppgávan hjá lmn er hinvegin at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt. Uppgávan er ikki at koma við tilmæli um avleiðingar. Ein annar advokatur var síðani frammi og visti á, sum rætt var, at lmn var ikki komin við nøkrum tilmæli um avleiðingar, men helt, at starvsskipanin hjá lmn átti at verið víðkað til eisini at komið við tilmæli um hetta. Tað er møguligt. Men her loyvi eg mær at spyrja sakkunnleikan, um hann heldur, at tað er so heppið at ein nevnd í løgtinginum skal ábyrgdast ta uppgávuna, at koma við tilmæli um avleiðingar fyri lógarbrot.

Nevndarlimirnir eru juridisk leikfólk, sum eisini eru løgtingslimir. Sum løgtingslimir hava teir *eisini* eftirlit við landsstýrinum. Og tí hevði eg hildið, at eg sum nevndarlimur í lmn, kann taka tann kasjettin av, tá eg fari av fundi har, og taka hin á, har tað stendur "løgtingskvinna", og tá siga, at eg haldi, at hasin ella handan eigur at verða koyrd frá, ella ákoyra reist ímóti, tí viðkomandi til dømis máar trúvirði undir tí politisku skipanini.

Ivist í um tað er ráðiligt, at ein trýmannanevnd mannað við leikum, um enn fólkavaldum, eigur at virka sum tilmælandi "dómstólur" . Men vónandi koma fleiri, sum eru meira avgjørd, um tann spurningin inn á banan við sínum grundgevingum.

**Kanningarstjóri**

Spurningurin um hvørt ein kanningarstjóri átti at kannað hvør orsøkin er til, at óheimilaðar útreiðslur eru slopnar fram við borðinum ár eftir ár, hevur nú tikið seg upp.

Høgni Hoydal vísti í kjaksendingini á, hvat gagn ein kanningarstjóri kundi havt fyri eftirtíðina, tá hesin m.a kundi staðfesta veruligu ábyrgdina, og kundi hesin víst á neyðugar broytingar innan lógarverk og fyrisiting. Hann kom ikki við einum orði um, at nakar ávísur átti ofrast.

Men til hendan spurningin, so forpurraði Kári á Rógvi heilt víst møguleikanum við kanningarstjóra. Og tað gjørdi hann í kjakinum við Jóannes Ejdesgaard. Kára´sa løgfrøðiliga vit druknaði í speiskum og provokerandi retorikki – hesaferð vent móti Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismálanevndini og advokatum í býnum!

Tá andstøðan dyrgir eftir at fáa ein meiriluta fyri kanningarstjóra, so hevur hon eisini brúk fyri undirskriftum úr samgonguni. Tá so er, er tað politiskt ógvuliga óbúgvið, beint undan møguligum undirskriftum, fyri opnari mikrofon at opinbera sína vón um, at veljarin fer at avhøvda ein av leiðarunum í samgonguni.

**Siti í landsstýrismálanevndini!**

Landsstýrismálanevdnin er ein av trimum eftirlitsfunktiónum hjá landsstýrinum. Hinar eru løgmaður sjálvur og so løgtingið. Og so er tað landsgrannskoðanin, sum kannar hvørji tøl landsstýrisfólkini arbeiða við og ger viðmerkingar til tey.

Sum ein av trimum nevndarlimum í landsstýrismálanevndini havi eg her valt at gera nakrar viðmerkingar til nøkur av teimum úttalilsum, sum hava verið í fjølmiðlunum, um niðurstøðuna hjá lmn í sambandi við ákærunar móti landsstýrisfólkum og teirra óheimilaðu meirnýtslu.

Kann verða í so nasadjarvt at koma við løgfrøðiligum rættingum til m.a dýrtdrivnar advokatar. Men helt, at okkara úttalilsi ikki týddi uppá, at úttalilsi teirra als ikki vóru í samsvar við grundgevingarnar fyri okkara niðurstøðu í landsstýrismálanevndini, ella at vit í minsta lagi tosað forbí hvønn annan. Vónandi verður hetta ikki tikið illa upp, men fari eg skeiv, so taki eg heldur enn fegin við mótspæli!

Góðan arbeiðshug og takk fyri viðmerkingarnar!